FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. november 2023
J. nr.: 23/20623-12
Viðgjørt: DH

Til Løgtingsins Fíggjarnevnd

Á fundi í Fíggjarnevndini hin 16. november varð avtalað, at Fíggjarmálaráðið skuldi senda nevndini hesar upplýsingar:

- Dagførda inntøkumeting av at avtaka skatta-serskipanir
- Hvør inntøkan er av at ovasta trin í skattastiganum lækkar úr 800.000 kr. til 600.000 kr.
- Inntøkutøl fyri uttanlandsinntøkur og fiskiveiðuinntøkur

Til hoyringina í Fíggjarnevndini varð greitt frá, at ávísar óvissur eru um tølini, sum vísa meirinntøkur við at strika uttanlandsfrádráttin. Fíggjarmálaráðið hevur tí saman við TAKS greinað tølini nærri og tikið atlit at bæði inntøku-linking og striking av frádráttinum fyri sosiala trygd.

Linking frá eksemption (undantøka) til credit (frádrátt)

Eftir norðurlendsku dupultskattaavtaluni ber til at skifta prinsipp fyri avtøku av tvískatting frá eksemption til credit. Hetta merkir í stuttum, at ein inntøka fer frá bert at vera skattað í arbeiðslandinum til at vera skattað bæði í arbeiðs- og bústaðarlandinum; tó soleiðis, at bústaðarlandið gevur frádrátt í álíknaða skattinum í bústaðarlandinum fyri skatt goldnan í arbeiðslandinum. Føroyar kunnu einsíðugt broyta støðu og fara frá eksemption til credit smb. grein 25, stk. 2 í sáttmálanum. Víst verður til løgtingsmál 76/2018.

Landsstýrið ætlar at boða hinum sáttmálapørtunum í norðurlendska tvískattasáttmálanum frá, at Føroyar skifta linkingarhátt. Farið verður frá undantøku (eksemption) til frádrátt (credit). Broytingin verður ætlandi frá inntøkuárinum 2025.

Samstundis verður uttanlandsfrádrátturin stigvíst strikaður. Tá fer føroyski skatturin at økjast hjá teimum, sum fáa uttanlandsfrádrátt. Skattainntøkurnar frá at broyta linking frá eksemption til credit verða tí við tíðini hægri.

Nakað omanfyri 2.000 føroyingar fáa inntøku frá arbeiði uttanfyri Føroyar. Av hesum eru DIS og FAS um 1.000. Fiskimenn í Grønlandi eru um 200. Fiskimenn í øðrum norðurlondum eru um 170. Onnur eru um 900. Av hesum 900 arbeiða 680 í norðurlondum, harav tey allar flestu í Noregi.

Dømi niðanfyri vísir hvussu ein persónur, ið forvinnur 700.000 kr. verður ávirkaður við kreditlinking og uttan uttanlandsfrádrátt. Munurin millum útlendska og føroyska skattin verður býttur javnt millum land og kommunu.

Til samanberingar er ein tilsvarandi føroysk inntøka á 700.000 kr. Í dømunum eru eingi sosial gjøld.

Dømi:

útlendsk inntøka		700.000
útlendskur skattur 25%	-	175.000
Inntøka eftir útlendskan skatt		525.000

eftir føroyskum reglum (2023)		
útlendsk inntøka		700.000
uttanlandsfrádráttur	-	120.000
Inntøka eftir uttanlandsfrádrátt		580.000
skattur av inntøku eftir uttanlandsfrátt (35%)	-	203.000
Inntøka eftir føroyskan skatt		497.000

eftir føroyskum reglum (2028)	
útlendsk inntøka	700.000
uttanlandsfrádráttur	-
Inntøka eftir uttanlandsfrádrátt	700.000
skattur av inntøku eftir uttanlandsfrátt (35%)	245.000
Inntøka eftir føroyskan skatt	455.000

til samanberingar - lønarinntøka á landi í Føroyum	
lønarinntøka í Føroyum eftir 2025	700.000
kommunuskattur 20%	134.000
landsskattur (sambært uppskotið)	128.950
inntøka eftir skatt	437.050

Striking av frádrátti fyri sosiala trygd

í fylgiskjali 2 til lógaruppskotini í "skattaumlegging 2024 og 2025" varð víst á, at eftir at staðfest er, at bæði heilsutrygdargjaldið og gjaldið til samhaldsfasta eru fevnd av norðurlendsku sosialkonventiónini, er ikki longur grundarlag fyri frádráttinum fyri sosiala trygd. Tí verður frádrátturin strikaður.

Sambært TAKS verða um 22 mió. kr. goldnar til sosiala trygd uttanlands. Tá ið hesin frádrátturin dettur burtur, skal inntøkan býtast millum land og kommunur. Mett verður, at partur kommunana av hesum er um 9 mió. kr.

Nýggj inntøkumeting fyri at taka av skatta-serskipanir við frádráttar-linking frá 2025

Mió. kr.	2024	2025	2026-2028	í alt
Uttanlandsfrádráttur	1	9	18	28
Sosial trygd -striking	10	5	7	22
Fiskimannafrádráttur	5	6	0	11
Samdøgursfrádráttur	2	2	2	6
Íalt	18	22	27	67
Til kommunur	4	2	3	9
Í alt til landið	14	20	24	58

Samlað skattaumskipan – dagførd meting

Mió. kr.	2024	2025	2026-2028	Í alt
Skattalætti	100	100		200
Striking av skatta-serskipanum	**-14**	**-20**	**-24**	**-58**
Grøn gjøld	-86	-35		-121
Munur	0	45	-24	21

inntøkan av at lækka ovasta trini í skattastiganum úr 800.000 kr. til 600.000 kr.

Metta inntøkan av at lækka ovasta trini í skattastiganum til 600.000 kr. er um 15 mió. kr. tá skulu um 2 mió. kr. trekkjast frá í mistum meirvirðisgjaldi og øðrum avgjøldum. Her verður ikki tikið hædd fyri, at hægri skattur á síðst vunnu krónuna kann ávirka atferðina, sum so minkar um meirinntøkuna enn meira.

Viðmerkjast skal, at lønarhækkingarnar fram til 2025 vera helst nakað hægri enn upprunaliga mett var. Av tí orsøk eru fleiri ið raka hægru trinini í skattastiganum, sum ger at meira kemur inn í skatti.

Yvirlit yvir inntøkur


Niðanfyri eru inntøkur, sum tær eru skrásettar av TAKS. Talan er um inntøkur, sum persónar hava havt frá ávikavist fiskiskapi við føroyskum ella útlendskum skipi og frá aðrari inntøku uttanlands. Viðmerkjast skal, at somu persónar kunnu hava aðra inntøku á landi í Føroyum ella telja við í fleiri bólkum.


Fyri fiskimenn í Føroyum sæst at ein stórur bólkur hevur rættiliga lágar inntøkur. Knapt 900 hava inntøkur undir 300.000 krónur og fyri hesar persónar verður sjómannafrádrátturin óbroyttur. Meðan tað eru um 600, sum hava inntøkur omanfyri 660.000 túsund krónur, sum merkir at

missurin av sjómannafrádráttinum er størri enn skattalættin. Fyri fiskimenn uttanlands eru færri við lágum inntøkum og fleiri við ársinntøku um milliónina.

Fyri uttanlandsinntøkur eru inntøkurnar býttar upp í lønarinntøkur á landi, brunnbátar og aðrar inntøkur, sum eru skattaðar eftir §25b. Hetta eru bólkar, sum Taks brúkar. Í yvirlitinum sæst, at fleiri lágar inntøkur eru fyri inntøkur á landi. Sambært Taks eru tað serliga handverkarar, har nakrir eru einstakar túrar.

Bólkurin brunnbátar fevnir til dømis eisini um vindmylluskip, meðan flestu av hægstu lønunum eru í bólkinum aðrar inntøkur. Hetta er t.d. menn, sum arbeiða á boripallum ella eru á øðrum skipum.





*viðm: frá 0 kr. til eina mió. kr.: ársinntøkan býtt í bólkar við 10.000 kr. í millum -
inntøkur omanfyri ein mió. kr. eru býttar bólkar við 100.000 kr. í millum.

